Børnini:

# Bleytur pakki og mentanarmál



*Umboð frá teimum ymsu politisku flokkunum vóru hóskvøldið á pallborðsfundi hjá Foreldrafelagnum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Longt barnsburðarfarloyvi, hægri barsilsløn, bíðilistin nullstillast, hægri prioriteringar og so framvegis eru bert nøkur av miðunum teir ymsu flokkarnir og politikararnir hava sett á dagsskránna. Um øll lyftini, sum verða hildin, skulu borgararnir í Tórshavnar Kommunu og í Føroyum sum heild, síggja lætt uppá framtíðina viðvíkjandi børnum, tí allir trupulleikar skulu loysast innan ikki heilt leingi**

PALLBORÐSFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*

Pallborðsfundurin hjá Foreldrafelagnum, felagnum fyri foreldur at smábørnum í Havn, hevði eitt umboð frá hvørjum av teimum politisku flokkunum. Og var tað breið semja millum allar politikkararnar, at ansingartrupulleikarnir hava verið raðfestir alt ov lágt, og okkurt skal gerast við hetta málið skjótast gjørligt.

Fundurin varð hildin í Klingruni í Norðurlandahúsinum, men eftir uppmøtingini at døma, skuldi ein ikki trúð, at umleið 350 børn stóðu á bíðilista í Havnini, tí foreldrini vóru ógvuliga fáment. Foreldrafelagið legði upp til áðrenn fundin, at hetta var eitt mál, ið skuldi setast á dagsskránna til komandi løgtingsval, og tað sást eisini aftur millum áhoyrararnar. Ein stórur partur av áhoyrarunum vóru landsins politikkarar, og eisini vóru fleiri býráðspolitikkarar møttir upp at leggja oyrað til, hvat teir ymsu flokkarnir høvdu at siga um ansingartrupulleikarnar.

### Samskipast betur

Foreldur í Havnini kunnu bara gleðast, tí tey fingu lovað bæði í ein enda og annan. Samfelagið er nú háttað soleiðis, at tað er tørvur á tveimum inntøkum, og tí skuldi samfelagið eisini skapað teir karmar, ið eru neyðugir fyri, at bæði foreldrini kunnu vera úti á arbeiðsmarknaðinum.

Laila á Lofti umboðaði hóskvøldið Fólkaflokkin, og gongur Fólkaflokkurin inn fyri, at foreldur skulu fáa tann fíggjarliga møguleika at velja, um tey vilja verða heima hjá barninum fyrsta árið. Her verður hugsað um hægri barsilsløn, longt barnsburðarfarloyvi og eisini skal barnafrádrátturin hækkast sambært Fólkaflokkinum.

Tjóðveldisflokkurin hevði sent Høgna Hoydal á pallborðsfund. Og Tjóðveldisflokkurin vil hava, at tey ymsu pedagogisku økini skulu samskipast betur. Markið, sum er millum skúlar, dagstovnar og forskúlar, skal niðurbrótast, og eigur man at samskipa arbeiðið millum hesar stovnar betur.

### Systkinaavsláttur

Javnaðarflokkurin sigur "Fólkið fyrst!". Tíðin er stutt og hetta er ein ítøkiligur trupulleiki. Boðið hjá Javnaðarflokkinum var, at innan trý ár, skulu borgararnir fáa tryggjaða eina ansingartrygd, barnsburðarfarloyvið skal leingjast til eitt heilt ár og systkinaavsláttur til foreldur, ið eiga fleiri stovnsbørn. Og skal alt hetta fáast í rættlag innan trý ár.

Heðin Mortensen var sambandsumboðið hóskvøldið. Sambandsflokkurin sigur, at øll skulu hava umstøður at sleppa í vinnu, og skulu ansingarplássini ikki bert skapa betri karmar fyri foreldur, pedagogar og børn, men eisini fyri vinnulívið. Fyrimunurin við at fáa børnini ansað botnar aftur í føroyska vinnulívinum.

– Um gongdin heldur áfram soleiðis, endar tað við eini skandalu, segði Roland Poulsen fyri Sjálvstýriflokkin. Hann tók fram eitt dømi um Japan, har kvinnur valdu at lata vera við at fáa børn, tí ómøguligt var at fáa ansingarpláss.

– Børnini hava stórt virði fyri okkum, tað eru tey, ið skulu halda samfelagum uppi. Tað, sum er heilt skeivt í hesum samanhanginum er, at alt ov nógv verður hugsað um profit, tá tað kemur til barnaansing, og samstarvið millum land og kommunu er alt ov vánaligt. Landið skal ikki tarna kvinnum í at fáa børn, segði Roland Poulsen millum annað.

Miðflokkurin hevur sum mið, at tryggja betri umstøður til børnini. Tey skulu raðfestast rætt, og ikki bara gevast upp í krónum og oyrum. Familjan skal takast frammum, sjálvandi innan fyri fíggjarlógarinnar karmar, men fólkini, ið eru undir fíggjarlógini skulu ikki gloymast.

### Gjørdi, gjørdi ikki

Fundurin hevði til tíðir hug at gerast eitt stórt partapolitiskt stríð ímillum teir ymsu flokkarnar. Hvør gjørdi hvat nær, og hvussu nógvir pengar vórðu settir av til hvat, og hvør hevði skyldina av hvørjum.

Men børnini eru bleytur pakki og mentanarmál, tað tóktiskt heilt klárt. Tey skulu raðfestast hægri, og øll skulu fáa sín bita av lagkøkuni.

Ein mamma, sum var á fundi, var enntá endað á forsorg, tí barnaansingarumstøðurnar eru so vánaligar, og um tú hevur eitt arbeiðspláss, ið ikki sýnir vælvild hesum viðvíkjandi, tykist tað ógjørligt at skula yvirliva á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Uppskotini vóru nógv, nógvar loysnir vórðu lagdar fram á borðið, øll høvdu sítt at siga. Hvat verður gjørt í framtíðini kunnu vit bara bíða eftir og síggja.

Leila á Lofti, Fólkaflokkurin:

# Minkar um trýstið



**Fólkaflokkurin vil virka fyri at økja barnsburðarfarloyvið til eitt ár. Við at økja um barnsburðarfarloyvið verður minkað um trýstið á núverandi stovnum, og kann hetta í síðsta enda føra til, at kommunan kann bjóða foreldrunum ansingartrygd**

POLITIKKUR
*Ingrid Bjarnastein*

– Fólkaflokkurin gongur við til at økja barnsburðarfarloyvið til eitt ár, tí soleiðis verður eisini minkað um ansingartørvin, sigur Leila á Lofti umboðandi Fólkaflokkin.

– Hvussu býtið verður millum mammu og pápa verður samrátt um, tá málið kemur fyri ting. Men eitt av grundsjónarmiðunum hjá Fólkaflokkinum er flexibilitetur, og familjurnar eiga at sleppa at skipa seg sjálvar, soleiðis, at tær sjálvar sleppa at avgera, hvør verður verandi heima.

Leila á Lofti heldur ikki, at hetta fer at ávirka samgongusamráðingarnar, tí semjan um økt barnsburðarfarloyvi tykist at vera ógvuliga breið.

– Útgangsstøðið má vera ansingartrygd, men tingini mugu hanga saman. Tað ber ikki til at bjóða foreldrunum ansingartrygd sum er nú, men økt barnsburðarfarloyvi hjálpir uppá trýstið, meðan kommunan framvegis skal halda fram við at útvega ansingarpláss til børnini. Um hetta verður gjørt kunnu vit til endans bjóða foreldrunum ansingartrygd, men hetta er bara ein av nógvum møguleikum til at gera hetta møguligt, sigur Leila á Lofti.

Ronald Poulsen, Sjálvstýrisflokkurin:

# Eigur at verða tikið upp



**Ronald Poulsen í Sjálvstýrisflokkinum sigur, at málið um økt barnsburðarfarloyvið avgjørt eigur at verða tikið upp, og flokkurin sjálvur gongur eisini inn fyri, at faroyvið verður økt til eitt heilt ár**

POLITIKKUR
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg meini so avgjørt, at barnsburðarfarloyvið skal økjast til eitt ár, sigur Ronald Poulsen í Sjálvstýrisflokkinum.

– Hetta skuldi ikki verið eitt flokspolitiskt mál, men heldur eitt samt løgting, sum tekur hetta á dagsskránna. Men hinvegin so skal eisini havast í huga, at tá eitt ár er farið eigur ein ansingarmøguleiki at vera at bjóða foreldrunum. Sjálvt um farloyvið verður longt til eitt ár, so loysir tað ikki ansingartrupulleikarnar sum so.

Ronald Poulsen heldur eisini, at páparnir skulu fáa møguleika at fara í farloyvi, og foreldrini eiga at avgera, hvussu hetta skal býtast upp.

Eisini leggur hann afturat, at hetta eigur ikki at koma at ávirka møguligar samgongusamráðingar. Men um ongin samtykt er áðrenn samgongusamráðingarnar, eigur hetta heilt avgjørt at verða tikið við.



Heðin Mortensen, Sambandsflokkurin:

# Tørvurin verður nøktaður

**Fremsta málið eigur at vera at nøkta tann ansingartørv, ið er. Sambandsflokkurin tekur undir við at leingja barnsburðarfarloyvi eitt ár, men eiga vit at nøkta ansingartørvin, tí at vera ov leingi frá arbeiðsplássinum kann fáa álvarsamar fylgjur, metir Heðin Mortensen**



*Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum*

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

– Sambandsflokkurin tekur undir við, at barnsburðarfarloyvið veður longt úr seks mánaðum til eitt ár, sigur Heðin Mortensen, tingmaður fyri Sambandsflokkin.

Heðin Mortensen umboðaði Sambandsflokkin á fundinum í Norðurlandahúsinum mikukvøldið. Hann vísir, at besta fyri øll er, um ansingartørvurin verður nøktaður.

– Tað er ógvuliga leingi at vera burtur frá einum arbeiðsplássi í eitt ár. Útviklingurin gongur við tí strúkandi ferð, og tað veðrur ringt hjá fólki at fylgja við aftur, tí má ansingartørvurin nøktast, tí hetta gevur besta úrslitið fyri øll, sigur Heðin Mortensen.

Heðin Mortensen heldur tað vera upplagt, at páparnir eisini møguleikan at taka ein part av hesum árinum, umframt sínar 14 dagar. Heðin metir harumframt, at landið noyðist at geva ein munandi íkast fyri at fíggja øktu barnsburðarfarloyvini.

Sjálvur er Heðin Mortensen eisini varaborgarstjóri í Tórshavnar Kommunu, og hann vísti á fundinum á, at 25% av útreiðslunum hjá Tórshavnar Kommunu fóru til barnaansing. Heðin legði dent á, at Tórshavnar Kommuna hevði stórar ætlanir um at nøkta tørvin innan barnaansing. Hann metti, at nú var 81% av tørvinum nøktaður, og eftir ætlanum hjá býráðnum, vildu 97% verða nøktaði í 2003. Hetta skuldi síggjast í sambandi við, at kommunan er í holt við fleiri byggi- og ansingarætlanir. Hetta vil eisini geva øktar íløgur, men hetta vinnur kommunan mestur innaftur, metir Heðin.

– Tað eru nøkur ting, sum eru eftir at fáa upp á pláss. Vit vilja hava tað soleiðis, at tey eldru og børnini gerast leys av íløguloftinum, ið kommunar verða ásettar at virka undir, sigur Mortensen.

– Eldra- og barnaøki eru mál, ið verða raðfest ovarliga til komandi val, og vit vilja hava hesi fremst í huganum, tá ið vit fara til samráðingar um eina møguliga samgongu, sigur Mortensen.

Høgni Hoydal:

# Tryggja rættindini

**Tjóðveldisflokkurin tekur undir við at leingja um barnsburðarfarloyvi til eitt ár. Fíggingin skal fáast til vega um arbeiðsmarknaðin, sigur Høgni Hoydal**



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður og formaður fyri Tjóðveldisflokkin*

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

–Tjóðveldisflokkurin tekur undir við at leingja um barnsburðarfarloyvi til eitt ár. Tað verður upp til foreldrini sjálvi at avgera, hvussu tey skipa hesa tíðina millum sín, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir á, at tryg fíggingin er ein fortreyt fyri, at hetta skal gerast veruleiki. Høgni metir, at økta barnsburðarfarloyvi skal fíggjast av arbeiðsmarknaðinum, og skal vera ein skipan, ið hvílur í sær sjálvum.

Á fundinum í Norðurlandahúsinum mikukvøldið vísti formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, á, barnaansing skal gerast til rættindi og ikki sum nú vera eitt sosialmál. Hann metir, at ein loysn á hesum viðurskiftinum er ein beinleiðis fortreyt fyri, at Føroya kunnu gerast sjálvstøðugt land.

–Vit vilja við okkara politikki geva eina ansingartrygd, og geva foreldrunum betri tíð og betri møguleikar við barni teirra. Vit mugu skapa livimøguleikar fyri nútímans familjuni, sigur Høgni Hoydal.

Atfinningar hava verið móti samgonguni fyri ikki at hava gjørt nóg mikið fyri at betra um korini hjá teimum eldru. Hetta heldur Høgni Hoydal verður loyst, tá ið greitt ábyrgdarbýti verður millum land og kommunu. Hann vísir á, at meðan núverandi samgonga hevur sitið er nógv hent fyri tað betra á sosiala økinum.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, segði á fundinum, at landsmyndugleikararnir skulu halda seg burtur frá barnaansingarøkinum, men hesum er Høgni Hoydal ikki heilt samdur við sínum borgarstjóra í.

– Landsmyndugleikararnir hava eisini eina uppgáva á hesum økinum. Tað eru vit, ið skulu skapa teir yvirordnaðu karmarnar, m.a. við at áseta ansingartrygd, sigur Høgni Hoydal.

Tá vit spurdu landsstýrismannin í m.a. sjálvstýrismálum, hvønn flokk sjónarmiðini hjá Tjóðveldisflokkinum lógu tættast upp at, heldur hann, at Javnaðarflokkuin liggur tættast upp at, men eisini Miðflokkurin líktist tjóðveldinum, hóast ikki heil javnstøða var millum flokkarnar.

Kristian Magnussen:

# Alt innan trý ár

**Javnaðarflokkurin lovar, at leingja um barnsburðarfarloyvi og geva ansingartrygd innan trý ár, sigur Kristian Magnussen**



*Kristian Magnussen, Javnaðarflokkurin.*

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

– Vit vilja geva systkinaavsláttur upp á ansing skjótast gjørligt. Innan trý ár vilja vit hava ansingartrygd og longt barnsburðarfarloyvið til eitt ár.

So avgjørdur var Kristian Magnussen í Norðurlandahúsinum mikukvøldið. Tað var eingin slingur í valsinum, tá Kristian Magnussen boðaði frá, hvørja ætlanir hansara flokkur hevur.

– Hetta er í tráð við tann politikk, ið flokkurin hevur sett út í korti. Her eru korini hjá fólkinum, sum verða tikin fyrst. Vit miðja eftir at geva fólkinum tað persónliga fullveldi, sigur Kristian Magnussen.

Hann metir tað, at børnini verða ansaði heima í eitt ár, fara at lætta munandi um á ansingarstovnum, tí lættir um trýstið.

Broytingarnar skulu fíggjast um verandi barnsburðargrunn, og tað kann væl hugsast, at landið eisini skal skjóta eitt sindur av pengum í.

– Tað er okkara uppgáva sum politikarar at tryggja fólki góð kor. Hetta gera vit við hesum, og tað kann ikki gerast ov nógv upp í pengum, sigur Kristian Magnussen.

Javnaðarflokkurin vil, umframt longt barnsburðarfarloyvi og ansingartrygd, geva systkinaavsláttur. Hetta merkir, at tað fyrsta barnið betalur fullan prís og hini børnini gjalda hálvan prís.

Sambært Kristiani Magnussen fær hetta málið stóran týdning í komandi samráðingum um samgongur og samansetingar.

Jónfinn Olsen, Miðflokkurin:

# Ein upplagdur møguleiki

**Jónfinn Olsen, umboð fyri Miðflokkin, heldur, at økt farloyvi so avgjørt er ein møguleiki, og flokkurin vil taka hetta upp, um eingin annar ger**



*Jónfinn Olsen úr Miðflokkinum*

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Jónfinn Olsen var umboð fyri Miðflokkin á fundinum um barnaansing, ið Felagið hjá foreldrum at smábørnum í Havn skipaði fyri. Jónfinn stillar vætnandi upp til løgtingsvalið fyri Miðflokkin.

Á fundinum vísti hann á, at loysnin við einum barnagarði á Landssjúkrahúsinum var ein sera góð loysn, ið vildi, saman við ætlanunum hjá býráðnum í Havn, taka so at siga allan tørvin á barnaansing í kommununi.

– Miðflokkurin hevur tað hugsan, at mamman eigur at kunna vera heima hjá barninum. Tað hevur stóran týdning, at valmøguleikin er til staðar. Pápin skal varðveita tey rættindi, hann hevur, og hann eigur eisini at kunna fáa ein part av tíðini hjá mammuni, um tey ynskja tað, sigur Jónfinn Olsen.

Miðflokkurin heldur harumframt, at myndugleikararnir eiga at hava atlit fyri at tryggja børnum rættindini so sum barnalækna. Spyrja vit, um Miðflokkurin tekur undir at økja barnsburðarfarloyvi, er støðan eisini greið.

– Vit taka undir við at gera fortreytirnar hjá børnum og foreldrum betri, og her er tankin um at økja barnsburðarfarloyvi so avgjørt ein møguleiki, og flokkurin vil taka hetta upp, um eingin annar ger, sigur Jónfinn Olsen.

Sjálvur er Jónfinn Olsen og flokkur hansara av teirri fatan, at vit ikki kunnu tosa um økt barnsburðarfarloyvi og rættindi hjá børnum uttan at taka øll rættindi hjá børnunum við, og her verður serliga hugsað um fosturtøkur.

– Tað verða tiknar einar 150-200 fosturtøkur, har flestu teirra eru óneyðugar. Her skulu rættindini hjá børnum eisini tryggjast. sigur Jónfinn Olsen.

– Okkara sjónarmið kunnu eisini síggjast sum svarandi við bíbilsk sjónarmið, har álagt verður okkum at taka okkum av teimum veiku og sjúku. Tað verður í síðsta enda ein spurningur um raðfesting, sigur Jónfinn Olsen.